# Fara at turka høvd og ryggir í Vági



*Palm Seafood í Vági er eitt virki í vøkstri. Nú verða 400 fermetrar bygdir upp í virkið og tá verður eisini farið undir eina nýggja framleiðslu*

**Palm Seafood í Vági byggir út, so at tey fáa arbeitt meiri fisk. Samstundis verður farið undir nýggja framleiðslu, sum er at turka høvd og ryggir til Afrikanska marknaðin**

ÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*

Palm Seafood er eitt av teimum fiskavirkjunum, sum vórðu sett á stovn í Vági í kjalarvørrinum á kreppuni, sum legði bæði fiskivinnu og alla aðra vinnu í Vági lamna.

Men síðani hevur gingið støðugt framá hjá Palm, ikki minst síðani eitt stórt íslendskt samtak, SÍF, Sølusamband Íslendskra Framleiðaranna, keypti helvtina av virkinum.

Nú er Palm Seafood eisini í ferð við at byggja út. Tilsamans verður ein høll bygt, sum er 400 fermetrar stórt. Hetta er ein útbygging sum kostar 1,3 millión, sigur Petur Johannesen, stjóri á Palm Seafood.

– Vit hava tvey endamál við útbyggingini, sigur hann. Tá ið útbyggingin er liðug, er Palm Seafood 1.275 fermetrar stórt.

Hann sigur, at fyrsta endamálið við byggingini er at gera umstøður til at kunna skera og pakka fisk ísenn.

Palm Seafood hevur lagt seg eftir at salta upsa, bæði fløk og flaktan og í fjør arbeiddu tey 2.800 tons, tað allarmesta var upsi, bert eini 300 tons vóru blálonga.

Men umstøður hava ikki verið til at pakka saltfisk, samstundis sum vit skera. Hvørja ferð, vit pakka, hava vit verið noydd at leggja framleiðsluna stilla og tað ætla vit at sleppa undan í framtíðini.

Hann sigur, at samstundis ber hetta í sær, at teir vera førir fyri at arbeiða meiri fisk.

Petur Johannesen sigur, at hann væntar, at teir kunnu arbeiða eini 4.000 tons, tá ið útbyggingin er liðug.

Í løtuni arbeiða um 20 fólk hjá Palm Seafood, ella gott tað. Arbeitt hevur verið næstan hvønn dag. Petur Johannesen sigur, at tað er ikki óhugsandi, at teir fáa brúk fyri einum 10 fólkum afturat, tá ið útbyggingin er liðug.

Hann sigur, at stórur eftirspurningur er eftir arbeiðsmegi í Vági, so hann veit ikki, hvussu tað verður at fáa støðuga arbeiðsmegi í framtíðini.

– Tíbetur hava vit varðveitt fólkið, vit hava havt. Spurningurin verður, hvussu verður við tí, vit skulu hava afturat.

– Men fáa vit ikki støðuga arbeiðsmegi í her, hava vit einki ímóti at fara uttanlands eftir fólki, tí tað er alt avgerandi at hava støðugt fólk, sigur hann.

### Turka høvd og ryggir

Petur Johannesen sigur, at útbyggingin verður liðug nú í januar og tá verður eisini farið undir eina nýggja framleiðslu í Vági.

Tað er at turka høvd og ryggir upp á sama máta, sum gjørt verður í Lorvík.

Hetta er ein framleiðsla, sum íslendingar eru komnir til Føroya við og Petur Johannesen sigur frá teimum, at tað stendur ikki at sleppa við við framleiðsluna.

Hetta er ein framleiðsla, sum verður seld til Nigeria, har vit hava skilt, at tey turkaðu høvdini og ryggirnir verða brúktir til súpanarbót.

Petur Johannesen sigur, at í fyrstu atløgu verður bara høvd og ryggir av fiski frá teimum sjálvum brúktir í hesi framleiðsluni.

Men gongst væl, fara teir eisini at keypa frá øðrum, tá ið framleiðslan og arbeiðshættir eru fingnir í rættlag. Av teimum 1,3 milliónunum, sum íløgan kostar, eru tær 600.000 krónur farnar til útbúnað at turka høvd og ryggir við.

Men fara teir at keypa slógv at turka, má meiri útgerð til og hon má so keypast afturat.

Tómas Tómasson:

# –Ein bati

**Formaðurin í Landsfelag pensjónistanna, Tómas Tómasson, heldur tað vera talan um ein bata, nú landsstýrið ætlar at geva pensjónistum loyvi til at vinna meiri pening. Tó heldur hann, at nógv meiri kundi verið gjørt**

PENSJÓNIR
*Heri á Rógvi*

Í Sosialinum fríggjadagin stendur at lesa eitt lesarbræv, sum formaðurin í Landsfelag pensjónistanna, Tómas Tómasson, hevur skrivað. Í greinini leggur hann ikki fingrarnar ímillum, tá tað kemur til at lýsa støðuna hjá pensjónistum í Føroyum.

– Grát mítt elskaða land, tað eru mong gomul fólk sum sita og gráta, ein gomul kona sum er sjúk, hon eigur ein blindan mann, hvat blívir av honum, um hon fellur frá áðrenn hann, skrivar Tómas Tómasson m.a. í lesarabrævinum.

Somuleiðis kemur hann eisini í greinini nogv inn á, at løgtingsvalið nærkast, og hann vísir á, hvussu nógvir teir í felagnum eru, og hvussu stóra ávirkan teir kunnu hugsast at fáa.

Í bløðuni seinastu dagarnar og á tíðindafundi týsmorgunin bóru umboð fyri landsstýri fram, at teir ætlaðu at bøta um viðurskiftini hjá pensjónistum, eitt nú við at loyva pensjónistum at vinna sær meira pening enn áður, áðrenn hesin kemur at ávirka sjálvan pensjónina til tann einstaka.

Tómas Tómasson sigur, at hann er sjálvsagt fegin, nú korini eftir øllum at døma verða betraði, men hann heldur framvegis, at nógv kundi verið gjørt afturat.

– Tað eru serliga ellis- og røktarheimini, sum hava hjálp fyri neyðini, og tað er stórur tørvur á fleiri og betri ellisheimum, sigur Tómas Tómasson.

Hann sigur harumframt, at ein ynskilig skipan var, um pensjónistar ikki bert kundu gjalda vanligan skatt fyri sína inntøku, sum kemur inn umframt tað, teir fáa í pensjón.

– Tað eigur ikki at vera meiningin, at pensjónistar bert skulu eta molarnar, sigur Tómas Tómasson.

Hann fílist somuleiðis á, at myndugleikarnir hava minka blokkin so mikið, tá so nógv liggur á láni á eldraøkinum.

– Tað kann tykjast ørkymlandi fyri okkum, og tað tykist sum um, at tað eru vit, sum skulu gjalda fyri fullveldi, sigur Tómas Tómasson.



# Kjølurin lagdur



*Stórur spenningur var í luftini, tá kjølurin til nýggju Norrønu varð lagdur mánamorgunin. Óli Hammer, stjóri í Smyril Line, væntar sær nógv av nýggja skipinum*

**Nýggja Norrøna er farin at taka skap. Mánamorgunin varð kjølurin lagdur á skipasmiðjuni í Lübeck í Týsklandi. Í tí sambandi var ein hátíðarløta hildin, har umboð fyri teir størstu íleggjararnar vóru til staðar. Óli Hammer er spentur um nýggja skipið**

SKIPABYGGING
*Stefan í Skorini*

Mánadagin var hátíðarløta á skipasmiðjuni Flender Werft í Lübeck í Týsklandi. Tað var í sambandi við, at kjølurin til nýggju Norrønu varð lagdur.

Til hátíðina vóru umboð frá Smyril Line í Føroyum. Umframt føroysku umboðini vóru fólk úr Íslandi og Hetlandi, sum hava lagt pening í stóru verkætlanina.

Tað varð gjørt soleiðis, at tríggjar myntir vórðu festar á eina plátu, ið hevði eina áskrift, sum segði frá, at hetta var Norrøna. Tær tríggjar myntirnar eru úr Íslandi, Føroyum og Hetlandi.

Plátan varð síðani fest á ein træbjálka, ið fer at liggja undir skipinum. Tá skipið verður sjósett tann 6. september í ár, verður møguleiki hjá einum og hvørjum at taka plátuna við myntunum. Plátan verður síðani latin reiðarínum, og finnarin fær ístaðin eina gullmynt. Hetta er vanligur siður í Týsklandi í sambandi við skipabygging.



*Ein stórur skarði av føroyingum var hjástaddur til hátíðarhaldið, sum var á skipasmiðjuni í Lübeck, tá kjølurin varð lagdur*

### Spentur um skipið

Óli Hammer er sera spentur um hetta nýggja og framkomna skipið, sum nú verður bygt. Hann væntar, at tað fer at økja um talið av ferðafólki og nøgdina av farmi, sum verður flutt millum londini.

Tá skrokkurin verður sjósettur tann 6. september skal skipið gerast liðugt innan. Væntandi verður Norrøna sett í sigling í mars 2003.

Skipið fer at taka 1500 ferðafólk umframt manningina.

# Advokatskrivstova letur upp í Saltangará

**Advokatskrivstovan, ið heldur til í Havn, letur nú upp eina deild í Saltangará. Hetta hevur samband við tað vaksandi vinnuliga virksemið í økinum, verður sagt av Advokatskrivstovuni**

ADVOKATAR
*Stefan í Skorini*

– Skálafjørðurin er vorðin ein miðdepil uttanfyri høvuðsstaðin, og vit kunnu økja um talið á viðskiftafólki okkara við at lata eina deild upp í økinum, sigur Ólavur Jákup Kristoffersen, ið er advokatur á Advokatskrivstovuni.

Hann leggur afturat, at hetta er tengt at tí vaksandi vinnuliga virkseminum í økinum, sum eisini hýsir einastu oljuhavnini í Føroyum.

– Við at hava eina skrivstovu kunnu vit veita eina betri tænastu í hesum økinum og norðanfyri sum heild, sigur Ólavur Jákup Kristoffersen.

Frammanundan er ein advokatfyritøka á Skálafjørðinum, og tað eru Jónfinn Thomsen og Poul Hansen, ið hava eina skrivstovu í Runavík.

Aðrar advokatfyritøkur hava havt deildir aðrastaðni í Føroyum enn í Havn, men í løtuni eru bara hesar báðar deildirnar uttanfyri Havnina.



*Í bygninginum hjá P/F Snaraløki í Saltangará fer Advokatskrivstovan at hava nýggju deildina. Advokatarnir vóna soleiðis at fáa fleiri viðskiftafólk*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Tveir dagar um vikuna

Nýggja skrivstovan letur upp hósdagin, og í fyrsta umfari verður hon bara opin tveir dagar um vikuna. Tað verður hósdag og fríggjadag.

– Nú royna vit, um grundarlag eru fyri at hava eina deild á Skálafjørðinum. Tí velja vit ikki at hava opið allar dagar í vikuni at byrja við. Hetta er ein varislig roynd at hava virksemi uttanfyri høvuðsstaðin, sigur Ólavur Jákup Kristoffersen.

Advokatarnir fara at hava skrivstovu á Heiðavegi í Saltangará í bygninginum hjá P/F Snaraløki. Frammanundan halda Føroya Tele, grannskoðarafelagið Rasmussen og Weihe og reiðaríið Snaraløkur til í nýggja bygninginum.

Advokatarnir á Advokatskrivstovuni fara at skiftast um at arbeiða á Skálafjørðinum, so at allir sleppa at royna seg á nýggja beitinum.

Umframt at veita íbúgvunum í økinum eina betri tænastu og møguleikan av fáa fleiri viðskiftafólk, nevnir Ólavur Jákup eisini, at Advokatskrivstovan kann hava annað virksemi so sum fundir í nýggju hølunum.

Hetta er fyrstu ferð, at Advokatskrivstovan flytir virksemi aðrastaðni enn í høvuðsstaðnum. Skrivstovan hevur røtur aftur til 1905 og er elsta advokatskrivstova í Føroyum.

Advokatarnir, ið starvast á skrivstovuni, eiga hana í felag, og eingin er stjóri, men teir stýra eisini í felag.